

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 11 - 2011

# Rógvi úr Havn lærir Faroe Petroleum tilbúgving í Norra

Seinastu 25 árini hevur havnarmaðurin Rógvi Finson Johansen arbeitt við tilbúgving, og í dag er hann partur av norsku tilbúgvingarfyritøkuni Acona, sum er í stórum vøkstri og sum eisini sær uppgávur í Norðuratlantshavi, Føroyum, Íslandi og Grønlandi sum eina spennandi avbjóðing. Kongstanki okkara er at stovnseta tilbúgvingardeplar (ICC) við lokalum starvsfólkum serliga ætlað frálandavinnuni í Føroyum, Íslandi og Grønlandi, sigur Rógvi við oljan.fo. Í løtuni heldur hann skeið fyri starvsfólkunum hjá føroyska oljufelagnum Faroe Petroleum, sum skal undir eina boring fyri fyrstu ferð sum fyristøðufelag í norskum øki. Stór krøv verða sett til tilbúgvingina og verða starvsfólk hjá oljufelagnum lærd upp til at liva upp til tey strongu krøv, sum norskir myndugleikar seta til tilbúgving í sambandi við oljuboring. Hvør er so hesin havnarmaðurin Rógvi Finson Johansen, sum fæst við slíkar spennandi og avbjóðandi uppgávur í norsku oljuvinnuni! Rógvi hevur drúgvar royndir á tilbúgvingarøkinum, hevur arbeitt við slíkum uppgávum seinastu 25 árini í fleiri londum. Umframt útbúgving innan Almenna fyrisiting (cand.scient.adm.) frá RUC, hevur Rógvi Johansen arbeitt sum yvirmaður í 10 ár og hevur verið knýttur at Redningsberedskabet (Civilforsvaret) í Danmark. Har arbeiddi hann við tilrættalegging, trygd og tilbúgving innan sjúkrahúsverk og samfelagstilbúgving. Frá 2000 til 2010 var hann samskipari fyri tilbúgvingini í Fiskimálaráðnum, m.a í sambandi við byrjanina av frálandavinnuni í Føroyum. Øll hesi árini brúkti hann væl av tíð til tess at menna t.d havumhvørvistilbúgvingina. Hesi árini hevur hann eisini arbeitt innan norðurlendskt tilbúgvingarsamstarv, umboðandi Føroyar í fleiri tilbúgvingarsamstarvum og var í 5 ár stýrislimur í The International Emergency Management Society, ið m.a. skipar fyri árligum altjóða ráðstevnum og verkstovum. Hetta seinasta árið hevur hann so arbeitt hjá

ACONA sum senior advisor, knýttur at Acona Incident Coordination Center. Uppgávur hansara eru serliga at gera tilbúgvingarætlanir, tilrættaleggja og koyra tilbúgvingarvenjingar og verða vaktgangandi á ICC. Harumframt hevur hann til uppgávu at menna marknaðin í Norðurhøvum, serliga Føroyum, Íslandi og Grønlandi. Kongstanki okkara er at stovnseta tilbúgvingardeplar (ICC) við lokalum starvsfólkum serliga ætlað frálandavinnuni í Føroyum, Íslandi og Grønlandi leggur Rógvi aftrat. Mynd - Rógvi Johansen, vitjar á FOIB skrivstovuni í Havn. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller Frá skeiðsrúminum hjá Acona, har starvsfólk hjá Faroe Petroleum fáa kunning um tilbúgving.